# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Fíggjarlógin – stýring og ábyrgd

So fingu vit loksins boðini um, at fíggjarlógin er komin undir land. Løgmaður, fíggjarmálaráðharrin og nú seinast fíggjarnevndarformaðurin hava meldað út, at semja er um fíggjarlógina, tó at allir partar ikki eru líka glaðir.

Tann annars so máttmikli formaðurin í Fíggjarnevndini, við tí yvirmenniskjansliga eyknevninum "Budda á Viðareiði", sigur við Sosialin í gjár, at hann hevur tapt slagið og hevur lagt kongin – hesaferð. Harvið er ikki sagt, at vit ikki koma at hoyra meira til Kallsberg. Tað koma vit uttan iva, tí hann ætlar sær ikki at taka nakrar avleiðingar av hesum og rýma úr Fíggjarnevndini. Tvørturímóti er hann longu farin at brynja seg út til komandi avgerðir, og her liggur helst í kortunum, at tunlarnir norður um Fjall koma á aftur íløgukarmin í næstu framtíð.

Hvat kunnu vit so brúka hesa sokallaðu semju til! Hava vit nú fingið eina fíggjarlóg, sum setir út í kortið ein nýggjan politikk, sum fer inn og fremur strukturellu broytingarnar, sum øll tosa um eru so neyðugar! Tekur fíggjarlógin hædd fyri teimum stóru avbjóðingunum, sum kreppan hevur við sær og sum avmarkaðu ressursur okkara geva rúm fyri!

Tíverri mugu vit svara nei til allar hesar spurningar. Fíggjarlógin er bara ein fantasileys dagføring við einum plenuklippara sum amboð. 2% av útreiðslunum hjá øllum almennum stovnum við undantaki av heilsuverki og nærverki, sum skal spara 0,75%. Man fer ikki inn spesifikt og spyr, um tað eru øki í samfelagnum vit noyðast at verða heilt fyriuttan ella fremja avmarkingar sum ein avleiðing av minkandi inntøkunum í samfelagnum.

Heldur enn eina sveinaroynd kunnu vit kalla fíggjarlógina fyri ein neyðsemju. Hon ber boð um manglandi stýring og ábyrgdarkenslu frá landsins leiðslu, sum annars nettupp er sett til at stýra og taka ábyrgd. Hon er meira at líkna við ein mekaniskan lut heldur enn eitt livandi fundament, har sett verður út í kortið av nýggjum við m.a. eini visión um struktuellar broytingar.

Her mugu vit geva Magna Laksafoss rætt, tá hann sigur, at ongar strukturellar broytingar síggjast aftur í fíggjarlógini tvs. at hon avspeglar ikki tað samfelag, sum vit hava í dag og koma at hava í mong ár fram. Hon nemur m.a. als ikki við dupultfunktiónir, sum nettupp eru partur av struktuellum broytingum. Hildið verður tvørturímóti fram við fleiri dupultfunktiónum eitt nú í sjúkrahúsverkinum sum var tað ein heilag lóg, ið er galdandi fyri alla framtíð: at vit skulu hava trý sjúkrahús kosta hvat tað kosta vil. Vit hava tvær tryggingarmiðstøðir og soleiðis kundi verið hildið fram.

Um somu tíð, sum ráðini verða meira og meira avmarkað, verður blokkurin niðurlagaður, yvirtøkur verða framdar og dupultfunktiónir sleppa at halda fram. Samfelagið Føroyar er merkt av væntandi stýring og manglandi ábyrgdarkenslu. Fyri ikki at siga manglandi politiskum dirvi til at taka neyðugar avgerðir.

Fíggjarlógarsemjan er prógv um, at ABC2 er ikki stjórnarfør, her er ov nógv, sum skilur og ov lítið, sum sameinar.

**Sosialurin**

## Meldar pass

**HENRIK OLD**



Nú hava vit í tvey fylgjandi kvøld sæð í Degi og Viku, at Magni Laksáfoss hevur boðað frá, at hann ikki kann luttaka longur í politiska arbeíðinum, tí hann ikki fær undirtøku fyri sínum sjónarmiðum um tær nógv umtalaðu bygnaðarbroytingarnar.

Hvørjar vóru so hesar sera umráðandi broytingar, sum vóru orsøkirnar til, at Magni Laksáfoss gav skarvin yvir?

Tann fyrsta var fiskimannafrádrátturin, tann næsta var ynski um avtøku av intøkutrygdini hjá fiskimonnum.

Tað er ófatiligt, at hesi bæði omanfyrinevndu mál skulu verða so avgerandi fyri ein persón, sum nýliga er komin upp í politikk, at hann sær seg noyddan at kasta frá sær.

Intøkutrygdin hjá fiskimonnum hevur virkað í 60 ár og hevur gjørt, at tá túrar av eini ella aðrari orsøk eru miseydnaðir, so hevur fiskimaðurin og húsarhald hansara ikki sitið við púra ongum, og enntá mátti betala fyri at verða til skips. Rætt skal vera rætt. Magni er ikki einsamallur í tí kórinum, sum vil hava intøkutrygdina og fiskimannafrádráttin burtur, tað tykist sum, at tað legst bara til í tí kórinum.

Hann boðar frá, at hann ikki vil verða livibreyðspolitikari, hvør skal siga, at allir hinir hugsa bert um seg sjálvan.

Er tað at vera livibreyðspolitikari at ein vil tryggja øllum nøkulunda umstøður, so er tað ikki so galið kortini.

## Vorðið sum jólagáva at fáa frá býráðnum

**Í samband við málið um framtíðina hjá 10. flokki í Havn hevur nógv verðið skrivað í bløðunum. Eitt tað festligasta er útsøgnin: "ov fáir næmingar eru til at skipa tvær 10. flokseindir við nøktandi undirvísingartilboði" – Syrgiligasta er mytan um milliónirnar, sum eisini er slongd út …**

Vit gerast nokkso forvitnar, tá ið vit lesa slík úttalilsi. Forvitnar eftir at frætta frá øðrum skúlum. Forvitnar eftir at hoyra, hvussu ólukkan tey yvirhøvur kunnu skipa skúla úti um landið.

Hvussu fáa til dømis klaksvíkingar sín 10. flokk at rigga?

Har hava tey einans umleið 60-65 næmingar, sjálvt um tey hava lagt saman í ein depil.

Hvussu ólukkan kann tað forsvarast?

Fáa børnini í Klaksvík eitt nøktandi undirvísingartilboð?

Skulu vit upp í 150 næmingar fyri at kunna undirvísa teimum ordiligt?

Tað skulu vit eftir øllum at døma í Havnini ...

... og vit sum billaðu okkum inn, at lærarar, sum arbeiða í Havn vóru dugnalig fólk ...

Íðan, um tað er treytin, hvussu kunnu tey yvirhøvur fáa tað at hanga saman í felagsskúlanum á Oyrarbakka?

Har ganga einans gott 80 næmingar.

Og teir eru enntá spjaddir um alla framhaldsdeildina ...

Hvussu fáa tey tingini at hanga saman í skúlanum við Løkin?

Hvussu bera lærarar í Vágum seg at?

Vestmenningar?

Ber tað við omanfyristandandi úttalilsi í huga yvirhøvur til at skipa nøktandi undirvísing í Suðuroynni?

Ella á Sandoynni?

Komið, kæru starvsfelagar, deilið tykkara positivu skúlasøgur við okkum.

Tað hevði heilt vist verið pláss fyri søgunum í blaðnum ... og hevði tað ikki verið herligt at frætt so nógv positiv tíðindi?

Hevði tað ikki verið gott, um vit høvdu eitt livandi orðaskifti um námsfrøðiligu tankar og undirvísingarligu royndir okkara?

Eitt livandi orðaskifti, sum gjørdi, at okkara kæru fólkavaldu fóru at síggja skúlarnar, sum tað teir veruliga eru: spennandi arbeiðspláss við dugnaligum fólkum føroyskum skúlabørnum at gagni ...

Nú tykist tað, sum um alt skúlaprát á politikarastigi einans snýr seg um betong og plasering.

Persónliga halda vit tað vera nokkso frustrerandi, og vit vita, at vit eru ikki einsamallar við hesi kensluni.

Komið og vísið teimum, at tað saktans ber til at gera undirvísingina bæði mennandi og spennandi, sjálvt um vit ikki hava 150 næmingar í einum árgangi.

Málið við 10. floks deplinum í Havnini kann jú saktans skapa fyridømi úti um landið alt ... og vilja vit tað?

Vit meina so við ... í Skúlablaðnum stendur at lesa, at Tórshavnar býráð søkti um at sleppa at loyva Eysturskúlanum at hýsa ætlaða 10. floks deplinum í E-lonini; men svarið var NEI, tað ber ikki til, tí tað skal vera ímóti skúlalógini at hava ein sjálvstøðugan skúla inni í einum øðrum ... og tað er her, málið av álvara gerst áhugavert, tí MMR skrivar til býráðið í Havnini, at tað ístaðin ber til at leggja allan 10. árgangin beinleiðis inn undir Eysturskúlan!

Men tað til?

Skal ein slík avgerð ikki fyrst út til hoyringar í teimum 11 skúlastýrunum í kommununi?

Skulu foreldur ikki verða hoyrd í slíkum máli?

Ella er tað í lagi, at skúlastýrini í Suðurstreymi øll hava sagt gott fyri einum sjálvstøðugum 10. floks depli, sum skal húsast fyribils í Eysturskúlanum, tá ið tað, tú

 ført, er, at allur árgangurin skal leggjast inn undir leiðslu- og bygnaðartørvin annars í Eysturskúlanum?

Undarligt kortini, at einasta skúlastýrið, ið mótmælir hesum, er skúlastýrið hjá Tórshavnar Kommunuskúla ... halda hini skúlastýrini ikki, at tað hevur týdning, at fáa málið lýst av nýggjum, tá ið fortreytirnar eru broyttar?

Hóskvøldið 17. december verður henda ivasama avgerð í MMR staðfest í býráðnum … vorðið sum jólagáva hjá Kommunuskúlanum at fáa ...

**Rudi Heinesen,**
**Malan Eyðunsdóttir**
**Tonnie Strøm og**
**Hjørdis Heindriksdóttir**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.